# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 28. nov. 2023 |
| Mál nr.: | 23/19640 |
| Málsviðgjørt: | TVR/AJ |
| Ummælistíð: | 28.11.- 11.12.2023 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp**
(Árlig prístalsjavning, lægri kringvarpsgjald fyri smærri virki, stovnar v.m. og broyting í kringvarpsgjaldinum fyri likamligar persónar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 91 frá 21. desember 2004 um kringvarp, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 26. mai 2010 og løgtingslóg nr. 163 frá 24. desember 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Allir likamligir persónar í aldursbólkinum 24 ár og fram til aldurin sambært stk. 2, ið hava fulla skattskyldu sambært § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, hava skyldu at rinda kr. 163,00 um mánaðin í kringvarpsgjaldi, sbr. stk. 5-6. Skyldan at rinda kringvarpsgjald tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur er fyltur 24 ár. Undantiknir skylduni at rinda kringvarpsgjald sambært 1. pkt. eru persónar, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar.”

**2.** § 7, stk. 2 verður orðað soleiðis: “Skyldan at rinda kringvarpsgjald sambært stk. 1 er kr. 63,00 um mánaðin fyri persónar, sum eru í fólkapensjónsaldri sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Skyldan at rinda kringvarpsgjald sambært hesum stykki tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur hevur rokkið tann í 1. pkt. nevnda aldur.

**3.** Í § 7, stk. 3 verður “stk. 4-5” broytt til: “stk. 5-6”.

**4.** Í § 7, stk. 3, nr. 5 verður “kr. 3.500,00,” broytt til: “kr. 3.000,00,”.

**5.** Í § 7, stk. 3, nr. 6 verður “kr. 2.000,00” broytt til: “kr. 1.500,00”.

**6.** Í § 7 verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 4.* Tann 1. januar á hvørjum ári verða gjaldsupphæddirnar sambært stk. 1 og stk. 2 prístalsjavnaðar við tveimum prosentum í mun til ta seinastu gjaldskyldugu upphæddina árið fyri.”
Stk. 4-5 verða eftir hetta stk. 5-6.

**7.** Í § 2, stk. 4, § 4, stk. 1, § 4, stk. 2, nr. 3, § 4, stk. 3, tvær staðni í § 4, stk. 6, § 8, stk. 8, § 10, stk. 5, § 15, stk. 1 og 3, § 16, stk. 2, tvær staðni í § 16, stk. 3, § 16, stk. 4 og § 19, stk. 5 verður “Landsstýrismaðurin” broytt til: “Landsstýrisfólkið”.

**8.** Í § 4, stk. 2, nr. 1, § 5, stk. 2, § 11, stk. 2 og § 15, stk. 2 verður “landsstýrismaðurin” broytt til: “landsstýrisfólkið”.

**9.** Í § 4, stk. 7, § 9, stk. 1 og 2, § 11, stk. 1 og § 16, stk. 1 verður “landsstýrismanninum” broytt til: “landsstýrisfólkinum”.

**10.** Í § 23 verður “landsstýrismannin” broytt til: “landsstýrisfólkið”.

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* § 1, nr. 1-5 koma í gildi mánaðin eftir, at løgtingslógin kemur í gildi.
*Stk. 3.* § 1, nr. 6 kemur í gildi tann 1. januar 2025.
*Stk. 4.* Øll krøv fyri kringvarpsgjald, ið stava frá tíðini, áðrenn henda løgtingslóg kemur í gildi, eru fevnd av áður galdandi reglum.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í samgonguskjalinum stendur, at miðlalandslagið og Kringvarp Føroya skulu styrkjast. Sum liður í hesum verður skotið upp at styrkja Kringvarp Føroya fíggjarliga við at hækka gjaldið úr kr. 150,00 um mánaðin og upp í kr. 163,00 um mánaðin. Hjá fólki í fólkapensjónsaldri verður skotið upp at hækka gjaldskyldugu upphæddina úr kr. 50,00 og upp í kr. 63,00 kr. um mánaðin.

Skotið verður eisini upp at prístalsjavna kringvarpsgjaldið fyri likamligar persónar á hvørjum ári frá og við 2025 at rokna í mun til árið fyri.

Harumframt verður skotið upp, heldur enn at nevna ávísan ovara aldur, at áseta, at tað eru persónar í fólkapensjónsaldri, ið koma undir lægra gjaldið, tí á tann hátt verður lagt upp fyri møguligum hækkingum í fólkapensjónsaldrinum.

Skotið verður eisini upp at lækka kringvarpsgjaldið fyri smærri stovnar og virki, so at stovnar, virki og aðrir løgfrøðiligir persónar, hvørs árligu lønarútreiðslur liggja millum kr. 100.000,00 – kr. 499.999,99 og millum kr. 500.000,00 – kr. 999.999,99 fara at rinda 500 kr. minni um árið, t.e. ávikavist úr kr. 3.500 í kr. 3.000,00 og úr kr. 2.000,00 í kr. 1.500,00 um árið.

Kringvarpsgjaldið hevur staðið í stað í nógv ár. Skal tað broytast, er neyðugt at broyta lógina. Stórur prísvøkstur hevur verið seinastu 18 árini – og serliga seinastu tvey árini. Eisini er tað

vorðið munandi dýrari hjá Kringvarpinum at keypa rættindi, eins og starvsfólkaútreiðslurnar eru vaksnar nógv, tí fleiri av starvsfólkunum í Kringvarpi Føroya eru vorðin fevnd av BA-stiganum hjá Starvsfelagnum. Hóast stóran fólkavøkstur seinastu árini er talið á fólki í fólkapensjónsaldri vorðið vaksandi. Tað hevur havt neiliga ávirkan á inntøkugrundarlagið hjá stovninum, tí tað ger, at alsamt fleiri verða fevnd av lægra kringvarpsgjaldinum.

Kringvarp Føroya hevur seinastu árini tikið nógv stig fyri at betra um raksturin, og í nov. 2023 eru áleið 11 ársverk spard burtur. Tílík skerjing fer at merkjast á framleiðsluni/skránni. Eitt nú ætlar leiðslan á stovninum at strika Nýggjárskonsertina, Í luftini og finalur innan flogbólt, svimjing og fimleik. Fiskivinnutingið verður eftir ætlan strikað, og helst verða eisini Torradagar, U-21 hondbóltur, Geytin og aðrar sonevndar Open-Broadcast framleiðslur strikaðar. Innan Aktuelt verða tímapressurnar í útvarpinum millum kl. 13.00 og 17.00 strikaðar, eins og ítrótturin verður munandi skerdur. Innan Mentan verður farið úr á leið 40 dokumentarum og niður í áleið 24. Eisini verða sendingar so sum Samværi, Vágskálin og Vikan strikaðar saman við tónleikasendingum. Helst fara skerjingarnar eisini at hava avleiddan virknað fyri sendingar til børn og ung.

Um eingi átøk verða gjørd, fer stovnurin í 2024 væntandi at hava eitt hall á umleið 8,5 mió. kr. Um verandi uppskot verður samtykt, kemur stovnurin so við og við í fíggjarliga javnvág.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi lóggávu er eingin prístalsjavning. Gjaldskylduga upphæddin í dag fyri persónar í aldursbólkinum 24-66 ár er kr. 150,00 um mánaðin, og fyri fólk yvir 66 ára aldur er kringvarpsgjaldið kr. 50,00 um mánaðin. Virki, stovnar og aðrir løgfrøðiligir persónar, hvørs árligu lønarútgjaldingar eru ímillum kr. 100.000,00 og kr. 499.999,99 rinda kr. 2.000,00 um árið í kringvarpsgjaldi, og løgfrøðiligir persónar, hvørs árligu lønarútgjaldingarnar eru millum kr. 500.000,00 og kr. 999.999,99 rinda kr. 3.500,00 í kringvarpsgjaldi um árið.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at bera so í bandi, at Kringvarpið so við og við kemur í fíggjarliga javnvág og at tryggja inntøkugrundarlagið móti árligum prísvøkstri. Eisini er eitt av endamálunum at lækka gjaldskyldugu upphæddina hjá smærri virkjum og stovnum.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Skotið verður upp, at tað eru persónar í fólkapensjónsaldri, ið koma undir lægra gjaldið, tí á tann hátt verður lagt upp fyri møguligum hækkingum í fólkapensjónsaldrinum. Skotið verður eisini upp at lækka kringvarpsgjaldið fyri smærri stovnar, virki og aðrar løgfrøðiligar persónar.

Hjá fólki undir fólkapensjónsaldur verður skotið upp at hækka gjaldið úr kr. 150,00 um mánaðin og upp í kr. 163,00 um mánaðin. Hjá fólki í fólkapensjónsaldri verður skotið upp at hækka gjaldskyldugu upphæddina úr kr. 50,00 og upp í kr. 63,00 um mánaðin. Skotið verður eisini upp at prístalsjavna kringvarpsgjaldið fyri likamligar persónar á hvørjum ári frá og við 2025 at rokna í mun til árið fyri.

Hesi átøk fara væntandi at gera, at stovnurin so líðandi kemur í fíggjarliga javnvág og verður tryggjaður móti árliga prísvøkstrinum. Uppskotið hevur tann fyrimun, at Kringvarp Føroya sum einasti public service-miðil í Føroyum verður styrktur fíggjarliga.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Hesi hava fingið uppskotið til hoyringar:

- Akademikarafelag Føroya
- Almenni hoyringarportalurin
- Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya
- Føroysk Miðlafólk
- Hini stjórnarráðini
- Kommunufelagið
- Kringvarp Føroya
- Landsfelag Pensjónista
- Miðlarnir (Miðlahúsið, JN, Knassar, Norðlýsið, PZ Miðlar, VP)
- Starvsfelagið
- TAKS
- Vinnuhúsið

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Kringvarp Føroya hevur ikki rakstrarjáttan á fíggjarlógini, tí stovnurin er óheftur av politisku skipanini, og tí er gjaldið ásett við lóg. Fíggjarligu avleiðingarnar eru sambært tølum frá Kringvarpi Føroya, sum lýstar í fylgiskjali 2, at stovnurin í 2024 og 2025 fær ávikavist kr. 5.426.336 og kr. 6.730.317 meiri inn í kringvarpsgjaldi sammett við støðuna áðrenn broytingarnar. Fyri allar likamligar persónar, verður gjaldið økt við kr. 13,00 um mánaðin.
Tó má helst eitt lítið fyrivarni takast fyri útrokningunum hjá Kringvarpi Føroya av inntøkunum tað fyrsta árið, ið hongur saman við, nær lógin kemur í gildi.

Harumframt verður frá og við 2025 ein árlig javning fyri likamligar persónar sett í gildi áljóðandi 2% samanborið við árið frammanundan. Sigast skal, at tað hevur ikki verið møguligt at fáa tølini frá TAKS, ið siga, hvussu býtið hevur verið millum ymsu gjøldini fyri kommunalu stovnarnar, men upplýsast kann, at kommunalir stovnar í 2023 hava goldið tilsamans kr. 2.462.000. Býtið millum ymsu gjøldini hjá kommunalu stovnunum er tó ókent, og TAKS hevur ikki útgreinað tað nærri.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at uppskotið fer at hava umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur, men fyri landið verður tað mest javningin, ið skal gerast á hvørjum ári, eins og eyðmerkjast má í skipanini hjá TAKS, hvør persónur er í fólkapensjónsaldri. Tað verður TAKS, ið framhaldandi fer at umsita kringvarpsgjaldið.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur jaligar fylgjur fyri tey virki, ið fáa ein lætta á kr. 500,00 um mánaðin, t.e. virki, ið hava havt árligar lønarútgjaldingar millum kr. 100.000 og kr. 999.999,99.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið fevnir ikki um nakrar millumtjóða sáttmálar.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið fevnir ikki um nakrar tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Nei.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Kringvarpsgjaldið og prístalsjavningin eru ásett í sjálvari lógini, og sostatt verður ikki mett, at talan er um nakað ósamsvar við delegatiónsforboðið ásett í § 41, stk. 1 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya, og so er hækkingin bert galdandi fram í tíð. Fyri virki og stovnar v.m., har gjaldið er knýtt at lønarútreiðslum árið fyri, er talan um eina lækking í kringvarpsgjaldinum, og tískil verður ikki mett, at tað er ein avbjóðing í mun til rættartrygd og stýrisskipan.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjald, tí kringvarpsgjaldið er at meta sum ein skattur, ið er tvungin, og har tað ikki er samsvar millum gjaldið hjá tí einstaka og tænastuna.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Ja, at rinda eitt hækkað kringvarpsgjald, sum frá og við 2025 verður prístalsjavnað á hvørjum ári. Smærri virki og stovnar fáa tó eitt lækkað kringvarpsgjald.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Nei.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Nei.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
*Til nr. 1:*
Gjaldskylduga upphæddin hjá fólki undir fólkapensjónsaldur hækkar úr kr. 150,00 um mánaðin og upp í kr. 163,00 um mánaðin.

*Til nr. 2:*
Upphæddin hjá fólki í fólkapensjónsaldri sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. hækkar úr kr. 50,00 um mánaðin og upp í kr. 63,00 um mánaðin.

*Til nr. 3:*
Fylgibroyting í tilvísingini.

*Til nr. 4:*
Fyri løgfrøðiligar persónar, har samlaða árliga lønarútgjaldið er millum kr. 500.000,00 og kr. 999.999,99, fer árliga kringvarpsgjaldið úr kr. 3.500,00 niður í kr. 3.000,00.

*Til nr. 5:*
Fyri løgfrøðiligar persónar, har samlaða árliga lønarútgjaldið er millum kr. 100.000,00 og kr. 499.999,99, fer árliga kringvarpsgjaldið úr kr. 2.000,00 niður í kr. 1.500,00.

*Til nr. 6:*
Upphæddirnar sambært stk. 1 og 2 verða frá og við 1. januar 2025 prístalsjavnaðar á hvørjum ári við tveimum prosentum í mun til árið fyri, t.e. at 1. januar 2025 verður gjaldið hjá likamligum persónum prístalsjavnað við tveimum prosentum í mun til 2024, og 1. januar 2026 verður gjaldið prístalsjavnað í mun til gjaldskyldugu upphæddina í 2025 o.s.fr.

*Til nr. 7-10:*
Samsvarandi broytingunum í tingskipanini verður orðið “landsstýrismaðurin” og ymiskar bendingar av tí broytt til: “landsstýrisfólkið” og ymiskar bendingar av tí.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu. Um lógin t.d. kemur í gildi í februar 2024, fara likamligir persónar at rinda nýggja gjaldið mánaðarskiftið eftir, at lógin er komin í gildi, t.e. í mars 2024.

Prístalsjavningin fyri likamligar persónar kemur í gildi í 2025, og tá verða tað gjøldini frá 2024, ið fara at vera grundarlagið undir fyrstu javningini. Í 2026 verður tað gjaldskylduga upphæddin í 2025, ið verður grundarlagið undir javningini o.s.fr.

Orðingin "í mun til ta seinastu gjaldskyldugu upphæddina árið fyri" kemst av, at lógaruppskotið fer helst at koma í gildi einaferð eftir 1. januar 2024. Fram til mánaðarskiftið eftir, at lógin kemur í gildi, fara likamligir persónar at rinda tað kringvarpsgjald, sum hevur verið galdandi. So fyri at gera púra greitt, hvat av gjøldunum, ið prístalsjavningin skal fevna um, so er tað nýggja gjaldið áljóðandi kr. 163,00 fyri fólk undir fólkapensjónsaldur, og kr. 63,00 fyri fólk í fólkapensjónsaldri, t.e. tann seinasta gjaldskylduga upphæddin árið fyri. Tískil má eisini eitt lítið fyrivarni takast fyri útrokningunum hjá Kringvarpi Føroya av inntøkunum tað fyrsta árið, tá ið lógin kemur í gildi.

Skiftisreglan viðv. krøvum merkir í stuttum, at um Kringvarpið hevur eitt krav mótvegis einstaklingum, áðrenn lógin kom í gildi, eru krøvini fevnd av áður galdandi reglum.

Almanna- og mentamálaráðið, xx. nov. 2023.

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: